

Ebenezer, N. Finsensgøta 6, Postboks 168, FO110 Tórshavn

Tórshavn, 14. oktober 2011

Til samkomuna

Kæru náðisystkin!

Tað er okkum av hjarta ein gleði at bjóða tykkum vælkomin til samfelagsstevnu í Ebenezer. Ætlanin er, um Gud vil, at hava møtini frá mikudegi 2. november til og við sunnudagin 6. november 2011.

Møtini byrja við bønarhaldi mikukvøldið kl. 20 í Ebenezer.

Møtini fríggjakvøldið, leygardagin, sunnudagin seinnapart og sunnukvøldið, umframt 'opið hús' fríggjakvøldið og leygarkvøldið kl. 22.30, verða í ítróttarhøllini á Hálsi. Hini møtini, íroknað morgunmøtið sunnudagin kl. 10.30, verða í Ebenezer.
Borðreitt verður við smurdum breyði í ítróttarhøllini millum møtini sunnudagin seinnapartin.

Innsavningin sunnumorgunin fer til trúboðararnar. Fyri at geva so mongum, sum gjørligt høvi at verða við til at stuðla trúboðarum okkara, er møguligt hjá einstaklingum og samkomum at flyta pening á kt. nr. 9181-495.323.3 í Eik.
Eisini er møguligt hjá tykkum, ið ikki hava høvi at koma á samfelagsstevnuna, at savnað inn í lokalu samkomuni og síðani flyta peningin.

Skrá fyri møtini liggur á heimasíðuni www.ebenezer.fo.

Vit heita á samkomurnar at biðja fyri teimum, sum skulu bera Orð Guds fram á møtunum. Tíðin er avmarkað, tí verða teir ikki so nógvir í tali, sum fáa høvi at bera ein boðskap fram. Serliga tá hugsað verður um allar teir, ið dagliga tæna samkomuni í Orðinum.

Heitið á samfelagsstevnuni 2011 er 'AT KENNA GUD'

| | |
|---|---|
| Fríggjadagin er evnið: | At kenna Guds endurreisn og varðveitslu |
| Leygardagin er evnið: | At kenna Guds vilja og leiðslu |
| Sunnudagin er evnið: | At kenna Guds stórleika og nærleika |

Havið í huga, at á møtunum hósdag og fríggjadag fyrrapart og seinnapart er høvi at bera ein boðskap fram úr orði Guds.

Biðið saman við okkum fyri samfelagsmøtunum, og at evnið 'AT KENNA GUD' verður okkum til uppbygging, troyst og eggjan, og menniskjum til frelsu. Okkara álit er, at Harrin vitjar okkum hesar dagar. Vit gleða okkum at hava samfelag við tykkum.

Tey, ið ikki vita sær innivist, verða biðin at venda sær til Helga Mortensen, telefon 515872.

Við bróðurheilsan

vegna samkomuna í Ebenezer

Osmundur Justinussen      Róland í Skorini      Napoleon Vang